tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 28.10.2021 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| Málsyvirlit | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 54/21 | 21/00435-1 | Skjalasavnið -útbygging/víðkan av hølinum 2021 |
| 55/21 | 21/00460-2 | FSR -umsókn um stuðul til bygging av nýggjum neysti á Hvítanesi |
| 56/21 | 21/00556-1 | Barnaverndartænastan BVT -eykajáttan 2021 |
| 57/21 | 21/00566-1 | Mentanarnátt 2022 |
| 58/21 | 21/00596-1 | Mýrifípan -Plásstrot 2022 |
| 59/21 | 21/00597-1 | Spælipláss við Frítíðarskúlan í Trongisvági |
| 60/21 | 21/00598-1 | Morgunmatur fyri 65+ |
| 61/21 | 21/00601-2 | Tvøroyrar skúli -keyp av innbúgv 2021 |
| 62/21 | 21/00617-2 | BVT Suðuroyar Barnaverndartænasta -fíggjarætlan 2022 |
| 63/21 | 21/00623-1 | Tryggingar -tilmælið til tryggingar 2021/2022 |
| 64/21 | 21/00626-2 | KT útbúnaður -tilmælið til dagføringar 2021/2022 |
| **Til kunningar** | | |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur upp skránna og spyr um viðmerkingar eru til skránna.

Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest ynskja viðmerkt, at tær taka ikki undir við skránni og ynskja at val av stýrislimi í BHS, Bú og heimatænastan kemur á skrá.

Kristin Michelsen viðmerkir, at eftirmetingarbólkur í kommunufelagnum er í gongd við at eftirmeta eldraøkið, og verður fundur um hetta sama 5. nov. 2021. Málið kemur ikki á skrá fyrr enn kommunalaeftirlitinum er liðugt at eftirmeta samstarvið á eldraøkinum.

Til støðutakan

**54/21**

**21/00435-1 Skjalasavnið -útbygging/víðkan av hølinum 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.05.2021 | 6/21 |
| 2 Mentanarnevndin | 20.08.2021 | 48/21 |
| 3 Mentanarnevndin | 14.09.2021 | 62/21 |
| 4 Mentanarnevndin | 14.10.2021 | 90/21 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 55/21 |
| 6 Býráðið | 28.10.2021 | 54/21 |

**Málslýsing: (kommunustjórin 07.05.2021)**
Forkv. í mentanarnevndini ynskir kunning um gongdina at útbyggja hølini hjá skjalasavninum har avsett eru á FÆ2021 kr. 700.000,- Til hetta verður tekniskileiðarin á fundinum at greiða frá.

**Mentanarnevndin 11. maj 2021:**
Málið verður útsett til næsta fund í mentanarnevndini

**Mentanarnevndin 20. august 2021:**
Málið verður útsett til næsta fund í mentanarnevndini

**Mentanarnevndin 14. september 2021:**
Kári Jespersen, leiðari á skjalasavninum var møttur á fundinum fyri at greið frá um gongdina, nu arbeiði at víðkað og dagføra Skjalasavnið. Kári greiddi frá MTV v/ Mortan Tormann Vang er arbeiðstakari og arbeiði gongur sum ætlað. KJ ger vart við at hæddin millum loft og gólv ikki verður tann, sum hann hevði ynskt, og viðførur hetta at tal av hillum verður minni enn ætlað. KJ er nøgdur við arbeiði, sum verður gjørt, og metur at úrslitið verður nøktandi við plássið til teirra virksemið.

Kári Jespersen greiddi eisini frá um støðuna viðv. -PH18, sum hevur fingið játtan til ístandgering. Nakað av avbjóðing hevur verði við veiting av játtan, men er hetta komið uppá pláss. Játtan kann bert leysgevast við loyvið frá verkætlanarleiðaranum, sum er Kári Jespersen. Arbeiði er byrja, men nakrar avbjóðingar eru viðv. Tjóðsavninum, orsakað av at pakkhúsið er friða. Maifinn Norðoy er arkitektur fyri verkætlanini. Arbeiðstakarar eru Pól f. Joensen, timburarbeiði og VERK í Trongisvági snikkara arbeiði. Arbeiðis skal eftir ætlan vera liðugt 31. desember 2024.

**Kommunustjórin 14. Oktober 2020**
Forkv. í mentanarnevndini, Anita Vibergsdóttir ynskir kunning frá Tekniskudeild um arbeði sum fer fram at víðkað skjalasavnið, nú plásssið ikki er tað sum var ætlað.

Forkv. í mentanarnevndini undrast yvir, hví stórt frávik er millum tað sum bygt er, og tað skitsu og ætlan, sum var gjørd og presentera av TD og samtykt av MN at fremja 9. Mars 2020. Og hvør orsøkin er til, at Tekniskadeild ikki hevur framt útbyggingina samb. egnu skitsu.

Forkv. í mentanarnevndini undrast yvir, og setir sp. við byggiháttin, sum sýnist ikki geva fult nyttuvirði av plássinum, har MN hevið samtykt, at hølisvíðkanin skuldi fremjast samb. samtyktu skitsu hjá TD og geva eyka pláss til 16x5m hillar.

Forkv. í mentanarnevndini ynskir greiðu á, hvørjar málsviðgerðir og samtyktir eru tiknar, sum liggja til grundar fyri, at útbyggingin ikki er framd samb. samtyktina í MN 9. Mars 2020, har tað sum nú er bygt, sýnist vera munandi minni enn lýst á skitsunum hjá TD, sum MN hevur grunda sína samtykt á 9 mars 2020.

Forkv. í mentanarnevndini ynskir greiðu á, hví MN ikki hevur fingið málið aftur til nýggja viðgerð, nú stórar broytingar er framdar frá tí sum er samtykt, og tí sum er bygt. Og at MN ikki er kunna um slíkt tíðandi frávik.

**Mentanarnevndin 14. oktober 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað. Einmælt samtykt, at Tekniskileiðarin kannar kostnaðin av, at fýrrúmi verður lagt afturat nýggja goymslurúminum. At oljuketil/fýr verður flutt annað stað í bygninginum, og at rúm hjá vaskifólkinum verður staðsett aðrastaðni í bygninginum. Teknisk leiðarin vendur aftur mánadagin 18. oktober 2021, við kostnaðarmeting.

**Kommunustjórin 20. Oktober 2021:**
Mentanarnevndin mælir til at eykajáttan á kr. 320.000,- verður játta til útbygging av Skjalasavnið, samb. kostnaðarmeting hjá tekniskaleiðara, soleiðis at arbeiði kann gerðast liðugt í inniverandi ári, og at uppíbyggingingin verður viðkað samb. tilmælið á fundi í mentanarnevndini 14. okt. 2021.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Einmælt samtykt, og eykajáttan verður veitt, og fíggingin verður við flytan millum konti. Málið verður beint býráðið.

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**55/21**
**21/00460-2 FSR -umsókn um stuðul til bygging av nýggjum neysti á Hvítanesi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 57/21 |
| 2 Býráðið | 28.10.2021 | 55/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 20.05.2021)**
Umsitingin hevur í eina tíð samrátt við nevndina í FSR Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, um bygging av nýggjum kappróðrarneysti á Hvítanesi. Stuðulsavtala er gjørd, sum verður løgd fyri aðalfund í FSR til samtyktar 24. Nov. 2021, og um samtykt á aðalfundi hjá FSR verður henda eftirfylgjandi løgd fyri Tvøroyrar býráð til samtyktar.

Stuðulsavtalan er í 14. punktum. Samlaði byggikostnaðurin er kr. 10.320.000,- ex. mvg. Tvøroyrar kommuna stuðlar við kr. 6.5 mió. ex. mvg. Lokale og Anlægsfonden stuðlar við kr. 3.8 mió.

**Lógargrundarlag: kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Borgarstjórin kunnar um, at aðalfundur hevur verði í FSR 24. okt., og hevur aðalfundurin samtykt stuðulssáttmálan við Tvøroyrar kommunu. Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at býráðið samtykkir stuðulssáttmálan sum fyriliggur. Fíggarnevndin mælir einmælt til, at FSR og Tvøroyrar kommuna áseta ein av fyrst komandi døgum, eftir býráðsfundin 28. nov., har spakin verður ísettur til bygging av nýggjum kappróðrarneysti.

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at stuðla FSR samb. fyriliggjandi stuðulssáttmála.

Val av limum í bygginevndina umboðandi Tvøroyrar kommunu.
Alvi Mortensen skjýtur upp at Jónleyg J. Bech og Kristin Michelsen vera fastir limir.
Jónleyg Jespersen Bech skjýtur upp at Alvi Mortensen verður varaumboð fyri Kristin Michelsen og at Anita Vibergsdóttir verður varaumboð fyri Jónleyg J. Bech.

Kristina Roest skjýtur upp, at Bjarni Hammer verður fastur limur. Súsanna Bertholsen skjýtur upp, at vara umboð fyri Bjarna Hammer verður Kristina Roest

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

**56/21**
**21/00556-1 Barnaverndartænastan BVT -eykajáttan 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 14.09.2021 | 23/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.09.2021 | 49/21 |
| 3 Býráðið | 30.09.2021 | 52/21 |
| 4 Býráðið | 28.10.2021 | 56/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 9. September 2021**
Forkv. í Sosialunevn ynskir at viðgerða fíggjarstøðuna og evt. eykajáttan til BVT fyri 2021. Á fundinum luttaka Amy Bech fíggjarleiði hjá TVK, og Jónleg Eyðunsson leiðari fyri BVT.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 26. mars 2021 (Barnaverndarlógin)

**Fíggjarligar avleiðingar:** Eykajáttan fyri FÆ2021
- *TVK hevur samlaða játtan á kr. 2.54 mió. til BVT í FÆ2021 samsvarandi 37,54% av rakstrinum fyri BVT (Býtislykilin er eftir fólkatalinum)*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Sosialunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 14. september 2021:**
Jónleyg Eyðunson og Amy Bech greiddi frá málinum.
- Neyðugt er at veita eykajáttan til BVT svarandi til kr. 1.68 mio. Av hesum ber Tvøroyrar kommuna 37,54% svarandi til kr. 631.242,-
- Umsorganar mál eru høvðus orsøkin til tørvin á eykajánn á kr. 1.2mió, og lønarútreiðslurnar eru øktar við 478tkr., sum stava frá tímlønt til konsulentar: fosturforeldur, stuðlar, sálarfrøðing og nakað til fyrisiting.

Mælt verður til at eykajáttan verður veitt av innistandandi, og málið verður beint í Fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. september 2021:**
Einmælt samtykt at Tvøroyrar kommuna ber meirkostnaðin samsvarandi býtislyklinum 37,54% (kr. 631.242,-), ið verður fíggja av innistandandi. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 30. september 2021:**
Forkv. í Sosialunevnd Jónleyg J. Bech, sum er limur í stýrinum fyri barnaverndina, greiddi frá um arbeiði í barnaverndartænastuni. Einmælt samtykt at takan undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini. Málið skal hava 2. viðgerðir.

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt við 2. Viðgerð.

## 57/21
## 21/00566-1 Mentanarnátt 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 14.09.2021 | 70/21 |
| 2 Mentanarnevndin | 12.10.2021 | 81/21 |
| 3 Býráðið | 28.10.2021 | 57/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Forkv. í Mentanarnevndini ynskir at vigerða og fyrireika Mentanarnáttina 2022

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022**

**Tilmælið:**

**Mentanarnevndin 14. september 2021:**
Málið var umrøtt, og verður tikið upp aftur á einum seinni fundi

**Mentanarnevndin 12. oktober 2021:**
Einmælt samtykt at Mentanarnátt 2022 verður 27. mai. 2022

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá mentanarnevndini.

**58/21**
**21/00596-1 Mýrifípan -Plásstrot 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 12.10.2021 | 29/21 |
| 2 Sosiala nevnd | | |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 67/21 |
| 4 Býráðið | 28.10.2021 | 58/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 10.10.2021)**
Forkv. í sosialu nevnd, Jónleyg J. Bech ynskir at viðgerða støðuna í barnagarðinum Mýrifípan, har stovnsleiðarin Kari Petersen hevur gjørt vart við, at plásstrot verður í januar 2022.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018

> *§ 3. Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt og hevur ábyrgdina fyri virkseminum. Dagstovnur sambært hesi lóg er vøggustova, barnagarður, frítíðarheim o.a. Dagrøkt sambært hesi lóg er ansing av børnum í heiminum og á spælistovum.*

**Fíggjarligar avleiðingar**: FÆ2021-2022

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 12. oktober 2021:**
Kari Petersen møtti á fundinum fyri at greiða frá støðuni. Kari Petersen mælir til at størri børnini í útibarnagarðinum flyta oman í kjallaran í skúlanum, at neyðugt er at seta 3 starvsfólk, at hølini eru klár til 1. desember, soleiðis at klárt er at byrja 1. desember. Einmælt samtykt at kommunustjórin tekur upp fund við skúlaleiðsluna fyri at finna eina loysn.

**Kommunustjórin 22. oktober 2021**
22. okt. 2022, kl 11:00, var fundur var við skúlaleiðsluna, leiðaran av barnagarðinum, forkv. í Mentanarnevndini og kommunustjóran inni í skúlanum í Trongisvági. Avtala var, at skúlin flytur virksemið við innskúling, sum er í kjallaranum, soleiðis at rúm verður fyri at útibarnagarðurin, har útibarnagarðurin frammanundan hevur verði. Avtala var, at hølini vera tøk hjá barnagarðinum 1. desember. 2021.

Økta virksemið í barnagarðinum viðførur, at neyðugt verður at søkja eftir 3 námsfrøðingum/ hjálparfólkum at røkja útibarnagarðin í kjallarinum í Skúlanum.

Tilmælið er, at avseta á FÆ 2022 játtan til hetta virksemið, og at hølini í kjallaranum í skúlanum vera hølir hjá útibarnagarðinum frá 1. desember 2021.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt tilmælið hjá sosialu nevnd og kommunustjóranum. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Kristina Roest mælir til, at umsitingin arbeiðir við loysn, har evt. dagrøktin verður sett á stovn aftur, fyri at nøkta tørvin á ansing.

Atkvøtt verður um tilmælið hjá Kristinu Roest
Fyri eru Kristina Roest, Bjarni Hammer og Súsanna Bertholdsen
Ímóti eru Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech og Alvi Mortensen
Tilmælið er harvið fallið

Atkvøtt var um tilmælið hjá sosialunevnd og fíggjarnevndini.
Fyri eru Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer og Súsanna Bertholdsen.
Ímóti Kristina Roest
Tilmælið er harvið samtykt

TVØROYRAR KOMMUNA

**59/21**
**21/00597-1 Spælipláss við Frítíðarskúlan í Trongisvági**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 12.10.2021 | 30/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 66/21 |
| 3 Býráðið | 28.10.2021 | 59/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 10.10.2021)**
Forkv. í sosialu nevnd, Jónleyg J. Bech ynskir at viðgerða viðurskiftini kring spæliplássið við frítíðarskúlan í Trongisvági, har stovnsleiðarin Kari Petersen hevur gjørt vart við, at økið er slitið og treingir til ábøtur.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018

> *§ 3. Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt og hevur ábyrgdina fyri virkseminum. Dagstovnur sambært hesi lóg er vøggustova, barnagarður, frítíðarheim o.a. Dagrøkt sambært hesi lóg er ansing av børnum í heiminum og á spælistovum.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2021-2022

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 12. oktober 2021:**
Ongin játtan er avsett á FÆ2021 til dagføringar av spæliplássinum við frítíðarskúlan. Mælt verður til at dagføra spæliplássið, og at fígging fæst av rakstraravlopið, har avlop verður mett til 625.000,-. Kari Petersen innheintar tilboð uppá dagføringar. Einmælt samtykt.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggarnevndina eftir at tilboð eru innkomin. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt tilmælið hjá sosialu nevnd. Málið verður beint í býráðið.

**Kommunustjórin 28.10.2021:**
Leiðarin av dagrøktini hevur heitt á 2 veitarar um at innlata tilboð, ið bæði eru innan fyri játtanarkarmin. Mælt verður til at leiðarin av barnagarðinum, saman við starvsfólkum í frítíðarskúlanum fáa heimild til at gera av, hvørt av teimum innkomnu tilboðunum, takast skal av.

Mælt verður til at fíggja hetta av rakstraravlopið til frítíðarskúlan, FÆ2021, §312.

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá fíggjarnevndini.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

## 60/21
## 21/00598-1 Morgunmatur fyri 65+

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 12.10.2021 | 33/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 65/21 |
| 3 Býráðið | 28.10.2021 | 60/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 10.10.2021)**
Forkv. í sosialu nevnd, Jónleyg J. Bech ynskir at viðgerða møguleikan har Tvøroyrar kommuna bjóða borgarum 65 ár og eldri til morgunmat og eitt gott prát nakrar ferðir um ári.

**Lógargrundarlag:** FÆ2022

**Fíggjarligar avleiðingar:** Okent

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 12. oktober 2021:**
Einmælt samtykt at bjoða hetta tilboð 4 ferðir um ári, har ein samling verður í inniverandi ári. Mælt verður til at hetta verður í SALT.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt tilmælið hjá sosialu nevnd, men mælir til at hølir hjá Tvøroyrar kommunu vera brúkt til tiltakið. Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**61/21**
**21/00601-2 Tvøroyrar skúli -keyp av innbúgv 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.10.2021 | 88/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 64/21 |
| 3 Býráðið | 28.10.2021 | 61/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 11. Okt. 2021**
Skúlastjorin Jón Johannesen hevur sent skriv til umsitingin við umbøn um loyvi til at keypa próvtøkuinnbúgv til Tvøroyrar skúla.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019

- *Kapittul 6, Fyrisitingin §47. Stk. 5. Kommunustýrið ger uppskot um skúlabygging og umbygging av verandi skúlum, smb. § 57, 4. stk.*
- *Kapittul 7, Meginfyrisiting og yvirumsjón §57. Stk. 4. Landsstýrismaðurin góðkennir øll byggimál og allar útbyggingarætlanir, ásetur reglur byggimálum viðvíkjandi, og hvussu ein fólkaskúli verður innrættaður.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2021Tilboð uppá innbúgv er kr. 205.920,- ex. mvg

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 12. oktober 2021:**
Einmælt samtykt

**Kommunustjórin 21.10.2021:**
Mælt verður til at játtanin til keyp av innbúgv verður fíggja av konto 411 «Íløg Tvøroyrar Skúli» har av sett eru á FÆ2021 kr. 2,8 mió.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Einmælt samtykt. Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**62/21**
**21/00617-2 BVT Suðuroyar Barnaverndartænasta -fíggjarætlan 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 54/21 |
| 2 Býráðið | 28.10.2021 | 62/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Umsitingin hevur móttikið uppskot til fíggjarætlan fyri 2022, fyri BVT, Barnaverndartænastuna, frá leiðaranum Jónleyg Eyðunsson.

Fíggjarætlanin er viðgjørd og samtykt á stýrisfundi í BVT hin 18. okt., við viðmerking frá fíggjarleiðarinum hjá Tvøroyrar kommunu Amy Bech, at 900tkr. eru løgt aftur at fyrra uppskotinum, hetta tí at barnaheimsplássini vóru ikki tald við í fyrra uppskotinum.

Fíggjarætlanin 2022 javnvigar við kr. 9.219.949,-, parturin hjá Tvøroyrar kommunu er 37,87%, svarandi til kr. 3.487.674,-.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 26. mars 2021

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2022, §2.21.32 Barnavernd, avseta kr. 3.487.674,-

*(FÆ2021, var avsett kr. 2.54 mió., umframt eykajáttan á kr. 632tkr.)*
*Orsøkin til eykajáttan FÆ2021, er øktar lønarútreiðslur, til konsulentar, samsýning til fosturforeldur, stuðlar, sálarfrøðing, og fyrisiting.*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Einmælt samtykt, málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Atkvøtt var um fíggjarætlanina 2022 fyri BVT, barnaverndartænastuna, einmælt samtykt.

## 63/21
## 21/00623-1 Tryggingar -tilmælið til tryggingar 2021/2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 60/21 |
| 2 Býráðið | 28.10.2021 | 63/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Umsitingin hevur viðgjørt tryggingarviðurskiftini hjá Tvøroyrar kommunu, har samrást hevur verði við tryggingarfeløg og tryggingarráðgevndifelag.

Kommunustjórin og fíggjarleiðarin mæla til at hildi verður fram við verandi tryggingarfelag, har nýggj avtala verður gjørt galdandi fyri eitt ár í senn, tvs. 1. Jan. 2022 til 31.12.2022.

**Lógargrundarlag: kommunustýrisskipanin**

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**64/21**
**21/00626-2 KT útbúnaður -tilmælið til dagføringar 2021/2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 70/21 |
| 2 Býráðið | 28.10.2021 | 64/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.10.2021**
Umsitingin mælir til at fremja dagføringar á KT skipanina hjá Tvøroyrar kommunu, hetta serliga fyri at bøta um trygdina og fyri at rúma meira data nøgd.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Mett verðru at kostnaðurin 2021/2022 verður kr. 223tkr.
FÆ2021, §115 íløgur í fyrisiting avsett kr. 851tkr.

**Tilmælið:** Mælt verður til at útvega KT útbúnaðin "2021/2022" í innverandi ári fyri kr. 222.498,-, og avseta kr. 124.350,- til útbúnaðin "2023" á FÆ2022.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

Til kunningar

## 28/21
## 20/00370-3 Vetrarhald - salting av vegi - sáttmáli við LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.10.2021 | 56/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 61/21 |
| 3 Býráðið | 28.10.2021 | 28/21 |

**Málslýsing:**
Møguligt er at gera sáttmála við LV um salting og kavarudding á ávísum høvuðsvegum

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Tekniska deild mælir til at gera sáttmála við LV, sum undanfarin ár.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2021:**
Nevndin samtykkir at leingja sáttmaálan við LV. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Einmælt samtykt. –Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**29/21**
**21/00035-1 Skattatøl 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.01.2021 | 1/21 |
| 2 Býráðið | 28.01.2021 | 2/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.02.2021 | 2/21 |
| 4 Býráðið | 01.03.2021 | 4/21 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 4/21 |
| 6 Býráðið | 26.04.2021 | 8/21 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 5/21 |
| 8 Býráðið | 27.05.2021 | 9/21 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 7/21 |
| 10 Býráðið | 16.06.2021 | 12/21 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.08.2021 | 9/21 |
| 12 Býráðið | 26.08.2021 | 20/21 |
| 13 Fíggjarnevndin | 27.09.2021 | 10/21 |
| 14 Býráðið | 30.09.2021 | 25/21 |
| 15 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 14/21 |
| 16 Býráðið | 28.10.2021 | 29/21 |

**Málslýsing: Samanbering av skattainntøkum í 2021**

**Kommunustjórin 01.03.2021**

- Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum

**Býráðið 01. marts 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 20.04.2021.**
Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum 2020/2021 (jan-mars)

**Fíggjarnevndin 22. april 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 26. april 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 15.05.2021.**
Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum 2020/2021 (jan-apr)

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 26. august 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 2. september 2021.**
Samanbering av skatti 2020/2021 –jan aug.

**Fíggjarnevndin 27. september 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað, málið verður beint í býraðið

**Býráðið 30. september 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

30/21

**21/00453-3 Umsókn um høli til veitan av psykologi praksis -Leigusáttmáli -Linda Jepsen 1.1.2021-31.12.2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 37/21 |
| 2 Sosiala nevnd | 20.08.2021 | 16/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 12/21 |
| 4 Býráðið | 28.10.2021 | 30/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 19.05.2021)**
Linda Jepsen hevur leiga part av Sjógøtu 23 til veitan av psykologi praksis, og er leigumálið gingið til 31.12.2021.

Linda Jepsen hevur vent seg til umsitingina við fyrisp. um leingjan av leigusáttmálanum, og er ynskið enn hitt sama, at veita 2 vitalur pr. viku (Tórs. og Frí.), tó við ynskið um at veita viðtalu til –eftir tørvi- til bólkar í felagshølinum í niðari hæddini.

Kommunusstjórin mælir til at leingja verandi sáttmálan fram til 31.12.2021, og at atlit vera tikin til annað virksemið í húsinum.

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Einmælt samtykt

**Kommunustjórin 11.08.2021**
Linda Jepsen, Cand. Psych. Aut. sum hevur leigusáttmála við Tvøroyrar kommunu á Sjógøtu 23, ynskir at viðkað um virksemið og bjóða viðgerð –í samráð við Sinnisbata- til avvarandi hjá fólkum, ið líða av psykologiskum trupulleikum.

Linda Jepsen skrivar í málslýsingini at:

> *Jeg har fået en forespørgsel fra Sinnisbati, der ønsker at starte et hold op for pårørende til psykisk sårbare mennesker i Suduroy, som jeg skal stå for. Der er en stor efterspørgsel og de har længe ønsket at udbyde denne mulighed.*
> *Den eneste mulighed jeg har for at afholde holdet vil være onsdag aften klokken 19.00, hvorfor jeg vil høre om muligheden for at få fast adgang til lokalet nedenunder, da det egner sig bedst til dette.*
> *Holdet skal køre fast hver onsdag, og der vil være nye hold ca. 3-4 gange om året med første forventede start i midten af september 2021. Holdet bliver dog kun oprettet, hvis der er over 6 tilmeldte.*

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** Verandi leigusáttmálin skal dagførast

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Sosialunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 20. august 2021:**
Einmælt samtykt at ganga umsóknini á møti og loyva Lindu Jepsen atkomu til felags høllini í 1. hædd.

**Kommunustjórin 20. Oktober. 2021**
Linda Jepsen hevur fráboðað, at hon hevur avgjørt at steðgað virksemið, og ynskir at uppsiga leigusáttmálan á Sjógøtu 23 pr. 31.12.2021. Linda er hørm um støðuna, og ynskir at takka Tvøroyrar kommunu fyri sera gott samstarv.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Málið málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 28. oktober 2021:**

31/21

**21/00454-2 Leigusáttmáli millum TVK og Eyðstein Lyngvej -Seglloftið**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 42/21 |
| 2 Býráðið | 16.06.2021 | 17/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 56/21 |
| 4 Býráðið | 28.10.2021 | 31/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 19.05.2021)**
Tvøroyrar kommuna hevur keypt og yvirtikið ogninar eftir TF.Thomsen matr. nr 492a, frá Sp.f. Coldstream pr. 1. mai 2021, har í m.a. var leigusáttmáli við Eyðstein Lyngvej um raksturin av Seglloftinum.

Leigusáttmálin ásetur, at hesin kann av báðum pørtum verða sagdur upp við 3. mnd frest til tann 1. í einum mnd., tó so, at útleigarin og leigari í fyrsta lagi kunna siga leigumálið upp 3. ár eftir at leigumálið tók við hin 13. Juni 2019. Tvs. at leigusáttmálin gongur til 31. Mai 2022.

**Leigugjaldið er ásett:**

- 2019 til kr. 5.000,-
- 2020 til kr. 7.500,-
- 2021 samb. sáttmálanum verður leigugjaldið ásett av nýggjum og ásett samb. prístalinum.
- Leigarin rindar fyri uttan leigugjald fyri nýtslu av el og olju.

Tilmælið er at áseta leigugjaldið fyri 2021 ájavnt við leigusáttmálan, og leigusáttmálin verður óbroyttur við undantak av at útleigarin frá 1. mai 2021 at roknað, verður Tvøroyrar Kommuna.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Einmælt samtykt, at leigugjaldið og sáttmálin heldur áfram óbroyttur fram til 31. mai 2022, tá sáttmálin verður uppsagdur, orsakað av at kommunan ynskir at endurskoða nýtsluna av Seglloftinum.

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Kommunustjórin 21.oktober 2021:**
Umsitingin hevur móttikið teldupost frá Eyðstein Lyngvej hin 20. oktober 2021, har boða verður frá, at hann uppsigur leigusáttmálan av Seglloftinum.

Tilmælið er, at Tvøroyrar kommuna skjótast gjørligt tekur støðu til hvat Seglloftið skal nýtast til.

Er ynskið at innihaldið skal vera áleið hetta sama, ið hevur verði í Seglloftinum seinastu árini (Matstova, veitslur, skeiðvirksemið o.a.l.) verður mælt til, at nýggjur leigusáttmálið verður gjørdur við annan loyvishavara skjótast gjørligt.

Upplýsast kann, at fleiri fyrispurningar eru um at leiga Seglloftið til veitslur o.a., og má støða takast til, um umsitingin –inntil leigusáttmáli er gjørdur við nýggjan loyvishavara- kann útleiga Seglloftið til einstøk tiltøk, og støða má takast til hvat leigukostnaðurin skal vera.

**<u>Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:</u>**
Borgarstjórin mælir til at søkt verður eftir nýggjum leigara at reka Seglloftið beinanvegin, og at umsitingin metur í hvørjum einstøkum føri, hvørt Seglloftið skal útleigast til einstøk tiltøk. Inntil nýggur leigisáttmáli er gjørdur, verður ábyrgdarpersónur settur, ið skal fyristanda Seglloftið tá tiltøk eru. Einmælt samtykt og verður málið beint í býráðið

**<u>Býráðið 28. oktober 2021:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað.
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

**32/21**
**21/00511-2 Suðuroyar sløkkilið -Umsokn um stuðul til keyp av útbúnaði send Betri Trygging 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tilbúgvingarnevndin (Brunanevndin) | | |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 13/21 |
| 3 Býráðið | 28.10.2021 | 32/21 |

**Málslýsing:** Tilbúgvingarleiðarin fyri Norðara helvt og tilbúgvingarleiðarin fyri Sunnara helvt hava hin 7 juli 2021 sent Betri stuðulsgrunninum umsókn um stuðul til keyp av tangabili.

**Kommunustjórin 20. Okt. 2021**
Til kunning hevur Nevndin fyri Betri Stuðul á fundi gjørt av at ganga umsóknini frá felagstilbúgvingini í Suðuroy á møti og stuðlar við 800.000 kr.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 18:00

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen